UTTAN ÚR HEIMI

## Vilja hava kvinnu

Sum væntað hevur týski forsetin, Johannes Rau, nú boðað frá, at hann stillar ikki upp til forsetavalið í mai næsta ár. Eygleiðarar í Berlin siga, at hetta var ivaleyst ein røtt avgerð, tí tann sosialdemokratiski forsetin hevði neyvan verið afturvaldur kortini.

Nú eru fleiri farin at tosa um, at Týskland eigur at velja eina kvinnu til forseta. Teirra millum er Gerhard Schrøder, kanslari. Men spurningurin er, hvør tað skal vera. Kristiligi demokraturin Angela Mærkel verður umrødd sum eitt av evnunum til forsetaembætið. Sjálv hevur hon víst hugskotinum aftur.

Sosialdemokratarnir hava eisini síni uppskot. Teirra millum er Jutta Limbach, sum er stjóri á Goethe-stovninum, og Renate Schmidt, fíggjarmálaráðharri. Tey Grønu hava eisini eitt uppskot. Tey hava bestan hug at skjóta upp á leiðaran fyri teimum eysturtýsku Stasi-skjalagoymslunum, Marionnu Birhler.

## Røngten til tollararnar

Um einar tveir mánaðir fær norska tollverkið serliga røntgenútgerð, sum tollararnir kunnu hava við sær, tá teir skulu leita eftir smuglaravørum á markinum millum Noreg og Svøríki og í havnunum, har ferjur úr útlondum leggja at.

Røntgenútgerðin skal setast í tveir stórar lastbilar. Kinesiska tollvaldið hevur nýtt somu útgerð eina tíð, og umboð fyri norska tollvaldið hava verið í Kina og kannað, hvussu útgerðin virkar. Royndirnar vísa, at við útgerðini kunnu tollararnir kanna innihaldið í umleið tjúgu bingjum um tíman, og tólini eru so sterk, at tey kunnu staðfesta innihaldið í bingjunum, sjálvt um tær eru gjørdar úr 15 sentimetra tjúkkum stáli. Men útgerðin er heldur ikki bílig. Teir báðir lastbilarnir og røntgenútgerðin kosta einar 35 milliónir krónur.

Annar av teimum báðum lastbilunum, sum tollvaldið hevur bílagt, kemur í november, og hann skal nýtast til at kanna teir mongu lastbilarnar, sum koma um svenska markið eystan fyri Oslo.

## Ølið ov dýrt

Felagið hjá teimum donsku handilsmonnunum krevur nú, at myndugleikarnir seta avgjaldið á øli niður fyri at avmarka handilin um týska markið.

Hagtølini vísa, at danir keypa alt meiri og meiri øl sunnan fyri markið, tí ølið er nógv bíligari har. Tað sama er við øðrum vørum, og tí er tað als ikki óvanligt í dag, at danir koyra til Týsklands at keypa meginpartin av tí, sum húsarhaldið hevur tørv á í gerandisdegnum. Stjórnin í Keypmannahavn hevur gjørt av at lækka avgjøldini á brennivíni, sodavatni og sigarettum frá 1. oktober, men tað munar alt ov lítið, sigur felagið hjá handilsmonnunum.

Sambært handilsmannafelagnum keypa danir fyri 6,2 milliardir krónur um árið úr handlum sunnan fyri markið, og tað er væl meiri, at fólk keypa fyri í øllum handlunum í Suðurjútlandi. Handilsmenninir vísa tí á, at verða munagóð tiltøk sett í verk fyri at skerja marknahandilin, fer tað at skapa nógv nýggj arbeiðspláss í donsku handilsvinnuni.

## Gomul gáta loyst?

Tann 7. november í 1974 hvarv enski lordurin Lucan, samstundis sum tænastugenta hansara varð myrd og kona hansara álopin. Dagin eftir varð bilurin hjá lordinum funnin blóðdálkaður, og løgreglan ivaðist ikki í, at tað var lordurin sjálvur, sum hevði myrt tænastugentuna, og at tað var hann, sum leyp á konuna.

Nú vil detektivurin og rithøvundurin Duncan MacLaughlin vera við, at lordurin rýmdi til India, tá hann hvarv, og at hann doyði har í 1996. Í einari nýggjari bók skrivar MacLaughlin, at lordurin fekk sær navnið Barry Halpin, og at hann búsetti seg í indiska býnum Goa í 1975.

Í bókini er ein mynd, sum ein annar onglendingur tók av Barry Halpin í 1991. Maðurin á myndini líkist sera nógv tí horvna lordinum, og myndatakarin hevur eisini greitt frá, at maðurin í Goa hevði júst somu vanar sum Lucan lordur.

# Korei loysir Abbas av



*Samstundis sum palestinar tingast um nýggjan forsætisráðharra, halda ísraelsmenn fram við álopunum á víðgongdar palestinar í Gaza. Men álopini raka eisini ósek*

**Eftir bert fýra mánaðir hevur Mahmoud Abbas, forsætisráðharri, lagt frá sær. Eftirmaður hansara verður eftir øllum at døma tingformaðurin Ahmed Korei.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Valdsstríðið millum Yasser Arafat, forseta og Mahmoud Abbas, forsætisráðharra, endaði sum væntað við, at Abbas legði frá sær. Longu sunnudagin boðaðu keldur hjá Arafat frá, at forsetin hevði biðið tingformannin, Ahmed Korei, taka við.

Korei, sum hevur verið formaður í palestinska tjóðartinginum síðani 1996, verður mettur sum ein av teimum hóvligu palestinsku leiðarunum. Hann er fyri varandi friði við Ísrael, men eygleiðarar í Miðeystri siga, at spurningurin er, hvussu fast tak Arafat hevur á honum.

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, sigur, at USA er sinnað at tingast við tann forsætisráðharra, sum palestinar velja. Tað sama sigur uttanríkispolitiski samskiparin hjá ES, Javier Solana.

Felagsskapurin hjá Arafat, Fatah, hevur góðtikið Ahmed Korei, og tað sama hevur PLO gjørt. Spurningurin er so, hvat Hamas, Islamskt Jihad og aðrir víðgongdir felagsskapir halda um hann, tí teirra støða er avgerandi fyri, hvat hann kann fáa av skafti.

# Læntu svenska útgerð til kríggið í Irak

**Í loyndum hevur svenska stjórnin loyvt bretska herinum í Irak at nýta ta mest framkomnu útgerðina hjá svensku verjuni.**

HERÚRGERÐ
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Líka síðani í vár hava bretsku hermenninir har suðuri í Irak havt sera framkomna útgerð, sum skal avdúka fremmandar rakettir og granatir. Útgerðin kann avdúka, hvaðani eitt møguligt rakett- ella granatálop kemur, so bretsku hermenninir kunnu svara álopinum við sera stórum neyvleika.

Men útgerðin er ikki bretsk. Hon er svensk. Talan er um eina sera framkomna mikrobylgjuskipan, sum stóra svenska fyritøkan Ericsson hevur ment til svensku verjuna.

Sambært Sydsvenska Dagbladet bíløgdu bretar fýra eintøk av skipanini í juli í fjør, men fingu at vita, at tað fór at taka Ericsson fleiri ár at lata teimum útgerðina. Tað vildu bretar ikki góðtaka og vendu sær beinleiðis til svensku stjórnina, sum í loyndum loyvdi bretum at leiga útgerðina frá svensku verjuni. Fyri nøkrum vikum síðani vórðu aðrar skipanir hjá svensku verjuni sendar til Afghanistan, har kanadiskir hermenn skulu nýta hana.

Ein talskvinna hjá Ericsson váttar fyri Sydsvenska Dagbladet, at fleiri lond hava víst teirri framkomnu útgerðini áhuga, eftir at bretar hava nýtt hana í Irak.





*Vatnskutararnir gjørdu meiri skaða enn gagn undir drápinum í Sandágerði leygarkvøldið.*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Vatnskutarar óegnaðir til grindadráp

**Nakrir mans á vatnskutarum spældu ein óvanliga virknan leiklut, tá ein grind legði beinini í Sandágerði í Havn um hálvgum sjey tíðina leygarkvøldið. Men teir spældu sín leiklut so illa, at grindaformenn umhugsa at biðja teir halda seg burtur næstu ferð grind er.**

GRINDARAKSTUR
*Rúnar Reistrup*
*runar@sosialurin.fo*

- Tað hevur víst seg, at grindarakstur gongur best um hann gongur hóvliga framá. Serliga tá grindin skal fáast at gera landgongd er umráðandi at fara spakuliga fram. Tað heldur Hanus Højgaard, sum er ein av grindaformonnunum í Havn. Tí var hann, eins og flestu av hinum grindaformonnunum, ikki beinleiðis bergtikin av at síggja hvussu nakrir mans á vatnskutarum lógu og uppskúmaðu alt Sandágerði, meðan roynt varð at fáa grindina at gera landgongd.

- Tað bleiv ov nógv rok harinni. Serliga tá grindin vendi og fór úteftir, tí tá komu vatnskutararnir í vegin. Meðan bátarnir fóru út aftur úr Sandágerði og løgdu seg í linju nakað uttan fyri at forða grindini, lógu vatnskutarar ímillum grindina og sandin, sigur Hanus Højgaard, sum fekk nógvar klagur um hesar vatnskutarar at hoyra beint eftir drápið.

Fleiri grindamenn vildu hava menninar á vatnskutarunum revsaðar við bót, sigur Hanus Højgaard, men tað vera teir neyvan, tí einki verður sagt í reglunum fyri grindadráp um, at ikki er loyvt at nýta vatnskutarar, og nakað beinleiðis ólógligt gjørdu teir ikki. Men grindaformenninir fara sum altíð saman við sýslumanninum at eftirmeta drápið. Tá fer nýtslan av vatnskutarum at verða tikin upp, og einki bendir á, at metingin verður nakað serliga positiv.

- Vit hava klára tað í nógv ár uttan vatnskutarar, og eg haldi at vit klára tað betur uttan, sigur Hanus Højgaard.

### Teir smæstu skulu fremst

Tað vóru tó ikki bara vatnskutaraskipararnir, sum bóru seg ov framfýsið at undir grindadrápinum. Eisini nakrir størri skjóttgangandi bátar lógu og skúmaðu sjógv heilt inni at landi. Teir skapa eisini óneyðuga órógv, heldur Hanus Højgaard.

- Tað eru gjarna teir smærru bátarnir, sum skulu liggja fremstir, tá komið verður inn ímóti landi við grindini. Teir størru skjóttgangandi bátarnir kunnu gera stóra nyttu í rakstrinum, eitt nú tá grindin kavar, men drúgvar royndir siga okkum, at drápið gongur best um man fer spakuliga fram, so øði ikki kemur í grindina.

### Runnu ov skjótt oman

Ongar reglur eru um júst hvørjir bátar skulu reka grindina inn ímóti sandinum. Í kunngerðini um grind verður einans sagt, at "Tað eigur so mest møguligt at verða strembað eftir, at teir smæstu bátarnir liggja fremst, teir størru bátarnir og skipini skulu liggja uttast". Vatnskutarar vóru ikki so vanligir í Føroyum um tað mundið, tá kunngerðin varð orðað, og heldur einki annað far verður nevnt við heiti.

- Man hevur fyrr umhugsað at hava greiðari reglur fyri hvørji før skulu gera hvat undir einum grindadrápi, og tað fara vit at tosa aftur um í næstum, sigur Hanus Højgaard.

At tað miseydnaðist at fáa grindina at gera landgongd í fyrstu atløgu fáa tó hvørki vatnskutararnir ella skjóttgangandi bátarnir skyldina fyri.

- Orsøkin til at grindin vendi, var allarhelst at fólkið á landi rann oman á sandin ov tíðliga. Tað hava vit longu tosað um, og teir, sum hava ábyrgdina av hesum, eru samdir, sigur Hanus Højgaard, sum leggur afturat, at tað eisini kann vera at grindin vendi orsakað av at sandbotnurin er vorðin nakað brattur, nú einki brim hevur verið og slætta botnin í longri tíð.

### Fyrimyndarligt

Drápið í Sandágerði leygarkvøldið gekk annars fyrimyndarliga væl sambært metingunum hjá grindaformonnunum, hóast tað ikki eydnaðist at fáa grindina at gera landgongd í fyrstu atløgu. Tað tók 15 minuttir at fáa lívið av teimum umleið 170 hvalunum, og drápið var næstan so "reint" sum tað kann vera.

- Kúluongulin (ið verður settur niður í blástrið á hvalinum, blaðm.) varð nógv brúktur til teir hvalirnar, sum ikki gjørdu landgongd. Ongulin er latin nógvum av teimum vonu grindamonnunum, og tað letur til at hann verður nýttur í alt størri mun, sigur Hanus Højgaard, grindaformaður.

Tað er Jústines Olsen, djóralækni, sum hevur ment kúluongulin og lagt øðrum lag á at brúka hann.



*Kúluongulin, ið Jústinus Olsen, djóralækni, hevur ment, varð nógv brúktur.*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen*